# Tillukku Rósa

JØRMUND VÁGADAL



Hetta er ikki bara fyrstu ferð at eitt sambandsumboð í Sandavági er komið á ting, men tað er uppafur stuttligari, at tað bleiv ein kvinna.

Tá eg byrjaði í 1974 saman við Paula Ellefsen, vóru ikki nógvar sambandsstemmur í Sandavági og sjálvt eftir nógv ára uppslítandi persónligari útspilling frá John Petersen (Myllhamar) í heimbygdini, so hevur tú megnað at koma inn á løgting, og tað vil eg ynskja tær tillukku við.

Vildi ynskt at eg var heima um vikuskiftið, men heilsa manninum.

Tú hevur nógv at livað upp til, og eg vóni at skorkarnir í løgtinginum ikki fáa teg av kós. Tað skuldi verðið lættari, nú Óli Brekkmann og nógvir av hansara monnum eru falnir.

Teir hava tosað í samfull 35 ár um skattalættar. Tað einasta eg síggi eru gribbar, sum í nærmastu framtíð koma at geva fiskiflotanaum mønustingin við at stinga pengar i privatar lummar, pengar sum teir einki eiga í og sum fiskurin nú skal gjalda.

Ver ikki kløkk, um tú kemur at sita við einari samfelagskreppu lík henni í 91.

Trúgv ikki einum orði frá hagfrøðingunum, soleiðis stóðu teir í 90'unum til síðsta minutt og fortaldu palleba, at her var ongin vandi.

Rósa, tá tú kanst fara til bilasøluna og ikki eigur klovan í bankanum og koma út aftur við einum bensinslúkara, so eigur onkur klokka at ringja.

Fakta: Eftir 35 ár eru vit dýrasta land at búgva í, og um tú skuldi verið óheppin í støðusárum, er lítil og ongin hjálp at finna.

Eg havi fult álit á tær, Rósa, og vóni, at tú broytir støðuna hjá okkum til ikki bara at vera heimsins dýrasta land at búgva í, men at vit merkja tað í dagligdegnum.

Var eg valdur inn á ting, so fór eg ikki í samgongu við Jørgin og kompany. Teir vilja fólkinum onki gott.

Hví ikki Tjóðveldi?

# Hjartans tøkk, og hjartaliga tillukku!

PÁLL Á REYNATÚGVU
varamaður á Tingi



Valið er farið afturum og fólkið hevur talað. Vil tí nýta høvið at takka øllum tykkum, sum farnu vikurnar, so ótroyttiliga hava nýtt tíð og orku, í royndini at vinna okkum umboð á Løgtingi, fyri Sandoynna, Sandoyar Tjóðveldisfelag, og fyri meg persónliga. Tað hevur verið ein heiður, og stuttleiki, at umboða tykkum á Tingi farnu árini, og vóni eg at politiska slóðin hevur virði. Tjóðin stendur tó til allar tíðir, omanfyri bæði persónar og flokkar.

Ein serlig tøkk til øll tykkum, sum hóast harðan ágang móti mínum persóni, stóðu okkum við lið og stríddust til tað síðsta. Vónin er sjálvsagt at flokkurin stendur seg væl í samgongusamráðingum, og at fólksins vilji sæst aftur í politisku ávirkanini. Livst so spyrst.

Hjartaliga tillukku tit, sum vunnu inn um tinggátt, nývald sum afturvald. Ein styrki fyri flokkin at kvinnurnar nú fjølgast á tingi, sum liður í nútímansgerðini av føroyska samfelagnum. Latið kortini ikki sterku sentralu umboðanina køva eginuppdriftina í ytru økjunum, men hjálpið útjaðaranum á leið, tí vit eru jú ein og sama tjóð, við somu rættindum.

Eina kvøðu og tøkk sendi eg eisini til tykkum, sum ikki stillaðu uppaftur, ella ikki vóru afturvald, og sum eg havi stóra virðing fyri, hóast vit ikki altíð róðu sama róður.

Takk fyri dystin og tillukku við gullinum!

# Fólkið ynskir fullveldissamgongu

NIELS UNI DAM
nielsunidam@yahoo.com



Fullveldissamgongan frá 1998 vann sær meirilutan aftur, og kann nú fáa gongd aftur á frælsistilgongdina. Um altso flokkarnir eru komnir yvir sítt politiska fornermilsi.

Fullveldissamgongan við Tjóðveldinum, Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum varð sett á stovn í 1998, og hóast samgongan í 2002 mátti hava styrk frá Miðflokkinum, so var meiriluti fyri fullveldinum. Eisini á valinum í 2004 valdi ein meiriluti í fólkinum at seta sín kross við fullveldisflokkar. Fjas og fjant og persónstrupulleikar gjørdu, at fullveldisflokkarnir ikki kundu semjast um eina samgongu, og tí sluppu sambandsflokkarnir framat saman við Fólkaflokkinum. Men føroyski fullveldisveljarin hevur ikki givið upp, og á valinum leygardagin fingu Tjóðveldi, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin aftur meirilutan av atkvøðunum. Fólkið ynskir fullveldi. Sambandsflokkarnir fingu ein frammaná við einans 13 av 33 tinglimum. Nú er at vóna, at politikarar megna at seta persónligar ósemjur til viks, virða fólksins vilja og stevnuskránna hjá Fólkaflokkinum, Tjóðveldinum og Sjálvstýrisflokkinum.

Sosialurin fyri 25 árum síðan:

# Eitt minutt frá óhappinum



tíðindablaðið sosialurin
56. árg. ★ kr. 4,-
Nr. 8 ★ hósdagur 20. januar 1983
frælsi javnaður bróðralag

Ein minutt frá óhappinum

Beint eftir at ein hvirla hevur tikið tekjuna og tveitt hana niður á ein buss-steðgistað — tvær kvinnur doyðu, onnur vórðu løstað

*Sum tað sæst, var tað ein rættuliga ógvuslig hending, tá tekjan á bygninginum millum slotskirkjuna og Kristiansborg reiv og datt niður á buss-steðgistaðið. Tvær kvinnur doyðu, og onnur vórðu løstað. Jákup Lindenskov fólkatingslimur var í bussi á veg til júst hetta steðgistaðið*